# Mín besta uppskrift

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Thordis Reynstind

## Dessert-køka við frukt

### At nýta:

Eldfast fat

1½ pk av róma
1½ pk av súrróma (18%)
1 blikk av peru
Umleið ein pakka av makrónum
12-15 rómabollar við ella uttan kokos, alt eftir hvat einum dámar
Frukt, tað ein eigur inni, t.d. kiwi, banan, víndrúur ella súrepli

### Framferðarháttur:

Legg makrónur í botnin á fatinum. Set rómabollarnar omaná, og trýst teir niður, ikki heilt flatar. Píska róman stívan, og rør súrróman uppí róman
Sker perurnar smátt, og blandað við róman- og súrróman. Legg hesa blandingina omaná rómabollarnar. Pynta síðani kakuna við tí frukt tú eigur inni.

Fyri at køkan skal síggja enn leskiligari út, kanst tú leggja 2-3 sløg av frukt á skrá í fatinum og stroya sjokulátabitar millum fruktrøðirnar.
Nýt títt egna huglflog!

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04

# Familjumyndirnar vit helst vilja gloyma

Awkward Family Photos byrjaði sum ein blogga við stuttligum familjumyndum. Nú er bók givin út, og endaði hon beinavegin á topplistanum hjá New York Times yvir mest seldu bøkur. Her eru nøkur dømi frá heimasíðuni.



Mamma mín var yvirtalað at taka hesa myndina saman við mær og beiggja mínum. Myndin vann faktiskt eina virðisløn í onkrari foto-kapping, men sjálvur havi eg mangan verið flovur av henni, skrivar hann, sum sendi hesa myndina inn.



So smílandi og fitt familja ... men hevur nakar sæð ommu?



Segði nakar 1980'ini?



Øll fingu líka náttklæði uttan pápi ...



Er tað eitt fuglareiður? Ella bara omma, sum hevur fønað sær hárið til veitsluna?



Er tað í lagi, at eg behaldi ringin, og tú fær eitt súrepli?

Kelda: http://awkwardfamilyphotos.com/

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos